# AÐALFUNDUR HJÁ FØROYA HAVBÚNAÐARFELAG
# 8. MAJ 2009

## <u>ÁRSFRÁGREIÐING 2008</u>

Havbúnaðarfelagið
Smærugøta 9A
FO-100 Tórshavn

## Frágreiðing frá nevndini

Føroyska framleiðslan av laksi og sílum var í 2008 umleið 45.000 tons í rundari vekt. Hetta er góð 15.000 tons meira enn undanfarna ár. Sum útlitini eru í løtuni verður roknað við at framleiðslan í 2009 verður á leið á sama støði sum í 2008. Karmarnir um alivinnuna eru yvirhøvur góðir og vinnan hevur seinasta árið víst nøkur góð úrslit, tá tað kemur til vøkstur og felli og eingir sjúkutilburðir hava verið. Saman við nøktandi marknaðarprísum hevur hetta gjørt, at alivinnan hevði hampilig fíggjarlig úrslit í 2008.

Roknað verður við, at útboðið av laksi á marknaðinum í Evropa og í heiminum sum heild, verður nakað minni í 2009 enn fyrr vænta, orsaka av sjúkustøðuni í Kili. Marknaðarprísurin á alifiski er í løtuni góður, men útlitini eru sera óviss orsaka av at fíggjarkreppa er. Alisøgan sigur frá, at prísurin sveiggjar sera nógv, men um føroyska vinnan megnar at hava ein burðardyggan rakstur og fyribyrgja sjúku, skuldi alivinnan klára at liva við teimum prísssveiggjum, sum fara koma.

Í 2008 vórðu 9 mió. fiskar settir á sjógv og roknað verður við, at millum 9 og 10 mió. fiskar verða settir út í 2009. Vøksturin í framleiðsluni komandi árini verður ikki líka stórur sum undanfarin ár og metir Havbúnaðarfelagið at framleiðslan er komin uppá eitt stabilt støðið.

Týdningarmestu málini, sum nevndin í Havbúnaðarfelagnum hevur arbeitt við í 2008 eru m.a. luttøka í arbeiðsbólki, sum endurskoðar alilóggávuna, hoyring av kunngerð um sjúkufyribyrgjandi rakstur í alivinnuni, stongsulin av russiska marknaðinum fyri føroyskar fiskavørur og mál um áseting av gjøldum á vinnuna.

Alilógin er til viðgerðar í Løgtinginum í løtuni og roknað verður við, at nýggja lógin kemur í gildi í næstum. Dagførda kunngerðin um sjúkufyribyrgjandi rakstur er til løgfrøðiliga eftirkanning og roknað verður eisini við, at hon kemur í gildi í næstum.

Viðvíkjandi útihýsingini av føroyskum fiskavørum av russiska marknaðinum er tað málið komið í drag. Havbúnaðarfelagið hevur strongt á at fáa málið loyst, men

tað vísir seg at ganga ómetaliga trekt. Fundir og samskifti hevur verið við russiskar matvørumyndugleikar og avtalur eru gjørdar, men allíkavæl sýnist tað sum um, at forðingar framvegis eru. Havbúnaðarfelagið metir støðuna verða ógvuliga ótolandi og ein forðing fyri framhaldandi menning av vinnugreinini.

Fyri kortum fekk føroyska alivinnan boð um, at dumpingtollurin á sílum er avtikin á ES marknaðinum. Hetta er sjálvsagt gleðiligt, men framleiðslan av sílum er fallandi og tí hevur sílamarknaðurin í ES ikki sama týdning í dag sum fyrr. Fræls marknaðaratgongd hevur alt at siga fyri víðari menning av alivinnuni og tað er ógvuliga umráðandi at politiska skipanin fokuserar á henda spurningin.

Alivinnuni eru áløgd fleiri og hægri gjøld. Havbúnaðarfelagið kann góðtaka, at vinnan skal gjalda fyri eftirlit, men treytin er, at almenni myndugleikin greitt kann vísa á reella kostnaðin. Higartil hava grundgevingarnar fyri ásetingini av gjøldunum als ikki verið nøktandi. Havbúnaðarfelagið eftirlýsir mannagongdir fyri áseting av gjøldum umframt ein dialog við myndugleikarnar um, hvussu og hvat fyri eftirlit verður framt, so hetta ikki verður nýtt til almenna umsitingin veksur enn meira.

## Innihaldsyvirlit

**1. ENDAMÁL FØROYA HAVBÚNAÐARFELAGS ....................4**

**2. ALMENT UM GONGDINA INNAN ALIVINNUNA....................5**

2.1 FRAMLEIÐSLA....................7
2.2 ÚTFLUTNINGUR....................8
2.3 PRÍSIR....................9
2.4 BÝTIÐ AV ÚTFLUTNINGI....................10
2.5 BÝTIÐ SEINASTU FÝRA ÁRINI....................11
2.6 ÚTSETING AV SMOLTI....................12
2.7 ALING AV TOSKI....................13

**3. MÁL FELAGIÐ HEVUR ARBEITT VIÐ Í ÁRINUM....................14**

3.1 STONGSULIN FRÁ RUSSISKA MARKNAÐINUM....................14
3.2 ALMENN GJØLD Á ALIVINNUNA HÆKKA ALSAMT....................14
3.3 TOLLUR Á SÍLUM Á ES MARKNAÐINUM....................15
3.4 ALILÓGGÁVAN ENDURSKOÐA....................15
3.5 RAKSTRARKUNNGERÐIN ENDURSKOÐA....................16
3.6 ALIRÁÐSTEVNA 2009....................16
3.7 ROGNASPURNIGNURIN....................17
3.8 HAVBÚNAÐARFELAGIÐ ER LIMUR Í EVROPISKA ALARARFELAGNUM FEAP....................17
3.9 TØKUHAGTØLINI....................18
3.10 ENDURGJALDSGRUNNUR ALIVINNUNAR AVTIKIN....................18
3.11 LANDSDJÓRALÆKNAEMBÆTIÐ FLUTT TIL HFS....................18

## 1. Endamál Føroya Havbúnaðarfelags

Havbúnaðarfelagið er vinnugreinafelag hjá alivinnuni, bæði á sjógvi og á landi. Endamál felagsins er at fremja tey mál, ið eru av felags áhuga fyri limirnar. Uppgávan hjá felagnum er at menna vinnuna í samstarvi við einstøku limirnar, myndugleikar og stovnar, ið varða av alivinnuni.

Felagið heldur til í Vinnuhúsinum og hevur felags umsiting við Føroya Arbeiðsgevarafelag og onnur vinnufeløg.

Í nevndini í Føroya Havbúnaðarfelag sita:

Ragnar Joensen, formaður

Atli Gregersen, næstformaður

Regin Jacobsen

Bogi Jacobsen

Frímund Hansen

## 2. Alment um gongdina innan alivinnuna

Alivinnan er væl fyri og úrslitini seinastu árini hava verið góð. Seinastu árini hava verið seks feløg, sum standa fyri alivirkseminum í Føroyum. Harumframt eru tvey smærri feløg, sum einans framleiða sílayngul og so Fiskaaling, sum rekur royndarvirksemi innan aling. Karmarnir um alivinnuna er góðir og hevur alivinnan ein skynsaman rakstur, har neyv framleiðslustýring er.

Bygt á góðar karmar og nærlagni, er alivinnan í dag burðardygg. Hetta sæst aftur, tí fiskurin veksur væl og hevur sera lágt fellið, samanborið við størstu kappingarneytarnar í Noregi og Kili. Hetta saman við hampiliga góðum marknaðarprísum hevur gjørt, at alivinnan hevur nøktandi avkast í 2008.

Meðan framleiðslan í 2006 og 2007 varð eyðkent fyri, at sera lítið var av fiski, var framleidda nøgdin av laksi og sílum í 2008 umleið 47.000 tons í rundari vekt. Tann avbera góði marknaðarprísurin, sum var í 2006, helt sær tó ikki í 2007, men tó hevur prísurin í 2008 verið hampiligur. Samlaða útflutningsvirðið frá alivinnuni í 2008 var góðar 900 mió. kr.

Samanumtikið hevur 2008 verið eitt gott ár og sigast kann, at alivinnan hevur er komin uppaftur á eina burðardygga og stabila framleiðslunøgd. Í ár verður mett, at tøkan verður á leið tann sama sum í 2008.

Í 2007 øktist útboðið av laksi á evropeiska marknaðinum og var eitt trýst á laksaprísinum. Í 2008 hevur gongdin verið á leið tann sama. Lági kursurin á norski krónuni gjørdi, at laksaprísurin til føroyska alaran eitt tíðarskeið seint í 2008 var ájavnur við framleiðsluprísin. Marknaðarprísurin er síðani hækkaður aftur samstundis sum kursurin á norsku krónuni eisini er hækkaður nakað aftur. Hvørji útlitini eru er torført at meta um, men tað vísir seg, at laksaprísurin heldur sær betri enn prísurin á øðrum fiskasløgum á evropeiska marknaðinum. Alisøgan sigur frá, at prísurin kann sveiggja sera nógv, men roknað verður við, at um alarar

hava ein burðardyggan rakstur og fyribyrgja sjúku, skuldi alivinnan megna at liva við teimum príssveiggjum, sum fara at koma.

At føroyska alivinnan var stong úti av russiska marknaðinum 1. sept. 2008 og var ein stórur smeitur fyri alivinnuna. Alivinnan hevur seinnu árini bygt upp ein markna í Russlandi, sum var áhugaverdur serliga fyri stóran laks, sum ikki gevur givið so góðan prís á ES marknaðinum. Stórt arbeiðið var lagt í at fáa opnað russiska marknaðin aftur og nú eru útlit fyri at útflytast kann til Russlands aftur í næstum.

Við ásetingum um árgangssundurskiljing, økishvíld og sjúkufyribyrgjandi atburði, verður mett, at alivinnan er áleiðis til at hava góðar karmar fyri burðardyggum rakstri. Tað eru hend stór framstig á hesum økinum og tað er sera týdningarmikið, at vinnan og myndugleikarnar alsamt arbeiða við at gera hesar karmar enn betri.

Sum víst var á seinasta ár, so eru onkur vandamál við verandi støðu. Alivinnan metir, at eitt veikt liði fyri vinnuna er innflutningurin av rognum. Tí tók vinnan felags avgerð um, umfamt at brúka føroysk rogn, bert innflyta rogn úr Íslandi í 2008. Hetta var gjørt fyri at verða fyrivarin fyri sjúku.

Seinastu árini eru royndir gjørdar við at ala tosk. Fiskaaling framleiddi toskayngul og tvær alifyritøkur settu tosk út til framleiðslu. Meginparturin av fiskinum er nú tikin og samanumtikið kann sigast, at framleiðslan gekk væl. Fiskurin vaks serstakliga gott og munandi betri enn toskur hjá okkara kappingarneytum. Lønsemi í framleiðsluni hevur tó ikki verið nøktandi og fallandi marknaðarprísir hava gjørt sítt til, at henda aling ikki er lønsom.

## 2.1 Framleiðsla

Framleiðslan í alivinnuni vaks nógv frá 1999 til 2003 fyri síðani at minka nógv fram til 2007. Í 2008 er tøkan komin uppaftur á eitt meira vanligt støði og roknað verður við, at framleiðslan næstu árini vil verða á leið tann saman sum í 2008. Tøkan í 2008 var góð 47.000 tons í livandi vekt.

Mynd 1. Tøka av alifiski fram til 2008 og forsøgn fyri 2009 (livandi vekt)




| | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 09m |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Síl | 0,915 | 1,440 | 1,260 | 3,292 | 1,315 | 3,335 | 11,149 | 10,220 | 5,092 | 4,493 | 5,496 | 7,648 | 8,943 | 7,645 |
| Laksur | 17,663 | 20,306 | 19,176 | 39,252 | 33,508 | 53,557 | 44,954 | 61,630 | 40,985 | 18,962 | 13,078 | 22,305 | 38,494 | 37,810 |

Kelda: Rúni Dam, sp/f Avrik. Forsøgnin fyri 2009 er ein meting

Metingin av tøkuni av laksi og sílum í ár, sum er grundað á útsetingar av smolti í 2008, verður mett at tøkan í 2009 verður umleið 45.000 tons í livandi vekt

Ábendingar eru um, at talið av smoltið, sum verður sett á sjógv í ár, fer at liggja beint omanfyri 10 mió. Við tí bygnaði, sum er í dag í alivinnuni og teimum kørmum, sum eru lagdir, verður roknað við einari støðugari framleiðslu, sum byggir á 10 -11 milliónir smolt árliga.

## 2.2 Útflutningur

Mynd 2. Útflutningur av alifiski í virði frá 1997 til 2008 (1000 kr)




Kelda: Hagstova Føroya

Mynd 2 vísir, at útflutningsvirðið á alifiski var í hæddini frá 1999 fram til 2003, tá hann táttaði í eina milliard krónur. Eftir 2003 fall útflutningsvirðið niður um hálvu milliardina, fyri síðani at hækka støðugt aftur frá 2006. Í 2008 var útflutningsvirðið knappa milliard. Prísurin higartil í 2009 hevur verið nakað hægri enn í 2008, men tað er sera torført at spáa um laksaprísin fyri restina av árinum.

Fíggjarkreppan, sum er vorðin búskaparkreppa, í nærum øllum heiminum ávirkar eftirspurningin og prísleguna á flestu vørum. Hvussu tað verður við laksinum er sera spennandi, men enn sær ikki út til, at eftirspurningurin og sostatt prísstøði á laksi er ávirkað av støðuni enn. Tað er tí ómetaliga torført at spáa um fíggjarligu útlitini í alivinnuni komandi ári, tí óvissan er sera stór.

Útflutningurin er bygdur á eina alivinnu, sum virkar innan fyri sera góðar karmar. Hesir karmar vóru lagdir, meðan alivinnan var í kreppu, og sum vóru við til at fáa áhugan hjá íleggjarum at gera íløgur í alivinnuna. Alarar eru í dag nærlagdir og hava ein skynsaman rakstur, har umhvørvisvernd og sjúkufyribyrging eru sett í

hásætið. Útflutningurin er tí bygdur á eina burðardygga alivinnu, har vágin fyri sjúku og vánaligum rakstri er neyvt stýrdur.

Marknaðaratgongd er tó framvegis ein avbjóðing hjá alivinnuni. Tollforðingin, sum hevur verið á føroyskum sílum á ES marknaðinum er júst tikin av, men sannroynd er, at slík tiltøk altíð kunnu verða væntandi. Í 2008 varð alivinnan stongd úti av russiska marknaðinum. Miðvíst hevur verið arbeitt við at fáa henda týdningarmikla marknað at lata uppaftur, men tað tekur sera langa tíð. Tað eru útlit fyri, at hesin marknaður letur uppaftur, men ein stongsil frá einum marknaði hevur serstakliga stóra ávirkan á vinnuna, at alt eigur at gerast fyri at ansa eftir ikki at koma í slíka støðu aftur. Tað hevur alstóran týdning fyri vinnuna, at føroyskir myndugleikar alsamt arbeiða við og tryggja, at marknaðaratgongdin fyri alifisk er so góð sum gjørligt. Herundir eisini at endurskoða Føroya støðu í mun til ES-limaskap.

## 2.3 Prísir

Marknaðarprísurin hevur stóra ávirkan á avrikið hjá alivinnuni, tí hann sveiggjar sera nógv. Mynd 3 vísir ársmiðalprís á feskum kruvdum laksi frá 1993 til 2006. Sum myndin vísir, eru umleið 6 ár millum prístindar og prísgjáir. Prístindar hava verið í 1994, 2000 og 2006, meðan prísgjáir vóru í 1997 og 2003.

Mynd 3. Ársmiðal prísir á feskum kruvdum laksi. FOB Føroyar




| | 1993 | 1994 | 1995 | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Prísur | 29,59 | 29,40 | 28,90 | 23,05 | 22,57 | 20,98 | 23,76 | 28,32 | 19,95 | 19,49 | 16,35 | 18,20 | 22,13 | 29,83 | 24,64 | 24,14 |

Kelda: Hagstova Føroya

Prísurin á feskum kruvdum laksi var í 2000 góðar 28 kr/kg og fall til 16,35 kr/kg í 2003. Prísurin hevur síðani hækkað á hvørjum ári til 2007, tá hann aftur lækkaði til 24,64 kr í miðal pr. kg. Í 2008 er miðalprísurin á feskum laksi 24,14 kr/kg.

Mynd 4. Miðalprísur pr. kg. av frystum laksaportiónum.




| | 1993 | 1994 | 1995 | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Prísur | 47,74 | 44,29 | 67,92 | 45,20 | 50,55 | 52,21 | 50,22 | 57,45 | 53,00 | 46,96 | 50,72 | 47,63 | 54,76 | 68,45 | 57,78 | 51,07 |

Kelda: Hagstova Føroya

Mynd 4 vísir meðalprísin á frystum laksaportiónum frá 1996, tá framleiðslan veruliga tók dik á seg fram til 2007. Prísurin á laksaportiónum sveiggjar eisini, men er væl meira støðugur enn prísurin á feskum laksi. Prísurin hevur ligið rættiliga støðugur omanfyri 50 kr/kg, men hevur onkur tíðarskeið dottið líka niður um. Miðalprísurin í 2006 var hægsti nakrantíð nevniliga 68,45 kr/kg. Í 2008 var miðalprísurin 51,07 kr fyri laksaportiónir.

## 2.4 Býtið av útflutningi

Mynd 5 vísir býtið av útflutninginum í virði. Feskur laksur hevur verið sera dominerandi partur av útflutninginum, men í 2006 kom broyting í, tá laksaportiónir vístu seg at eiga stóran part av útflutninginum. Í 2007 táttaði útflutningsvirðið frá alivinnuni í góðar 700 mió.kr. Roknað verður við at útflutningsvirðið frá alivinnuni í 2009 verður á leið á sama støði, sum í 2008.

Mynd 5. Útflutningsbýtið av alifiski í virðið




Kelda: Hagstova Føroya

Útflutningsvirðið frá alivinnuni fall sera nógv frá 2003 til 2006, meðan tað í 2007 og 2008 aftur vaks munandi og er nú komið upp á áleið sama støðið sum í 2003. Útflutningsvirðið á laksaportiónum, hevur tó víst seg at vera sera javnt øll árini. Roknað verður við, at útflutningsvirðið fyri laksaportiónir ferð at vaksa nakað afturat komandi ár, tí framleiðsluorkan er vaksin.

## 2.5 Býtið seinastu fýra árini

Niðanfyri er eitt samlað yvirlit fyri útflutningsvirði, nøgd og prísir fyri ymsu vørurnar, sum alivinnan framleiðir. Fráskurður o.a. er ikki við. Tølini eru fyri seinastu seks árini.

Talva 1. Útflutningsvirði fyri ymsu vørurnar frá 2003 til 2008

| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Feskur laksur | 532.620 | 424.299 | 206.522 | 134.650 | 251.689 | 538.511 |
| Frystur laksur | 39.170 | 69.632 | 53.660 | 32.573 | 54.922 | 40.560 |
| Laksaportiónir | 224.297 | 184.324 | 169.967 | 195.024 | 170.587 | 204.873 |
| Laksur, annað | 8.211 | 6.731 | 9.703 | 12.074 | 10.921 | 16.248 |
| Fesk síl | 4.074 | 447 | 484 | 34.657 | 14.037 | 13.793 |
| Fryst síl | 155.353 | 76.547 | 58.190 | 64.034 | 86.730 | 123.624 |
| Síl, annað | 485 | 372 | 0 | 168 | 0 | 73 |
| **Tilsamans** | **964.209** | **762.351** | **498.526** | **473.178** | **588.887** | **937.684** |

Kelda: Hagstova Føroya

Talva 2. Útflutningsnøgdin fyri ymsu vørurnar í 1000 tonsum

| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Feskur laksur | 32.581 | 23.312 | 9.330 | 4.514 | 10.217 | 22.307 |
| Frystur laksur | 2.050 | 3.509 | 2.374 | 1.073 | 2.071 | 1.586 |
| Laksaportiónir | 4.423 | 3.870 | 3.104 | 2.849 | 2.953 | 4.011 |
| Laksur, annað | 630 | 479 | 736 | 1.131 | 1.374 | 2.072 |
| Fesk síl | 281 | 21 | 19 | 1.302 | 636 | 643 |
| Fryst síl | 7.680 | 3.607 | 2.802 | 2.302 | 3.864 | 5.534 |
| **Tilsamans** | **47.644** | **34.797** | **18.364** | **13.172** | **21.115** | **36.155** |

Kelda: Hagstova Føroya

Talva 3. Miðal útflutningsprísir fyri ymsu vørurnar pr kg

| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Feskur laksur | 16,35 | 18,20 | 22,13 | 29,83 | 24,63 | 24,14 |
| Frystur laksur | 19,11 | 19,84 | 22,61 | 30,36 | 26,52 | |
| Laksaportiónir | 50,72 | 47,63 | 54,76 | 68,45 | 57,78 | 51,07 |
| Fesk síl | 14,50 | 21,29 | 25,47 | 26,62 | 22,06 | |
| Fryst síl | 20,23 | 21,22 | 20,77 | 27,81 | 22,45 | |

Kelda: Hagstova Føroya

Sum talvurnar vísa so er bæði nøgdin og útflutningsvirðið av vørum frá alivinnuni voksin seinasta árið. Verður hugt eftir miðalprísinum á ymisku vørunum sæst at miðalprísurin á øllum vørum er fallin munandi í mun til 2006, sum var eitt sera gott ár. Tó er prísurin framvegis á einum slíkum støði, at alivinnan vinnur pening.

## 2.6 Útseting av smolti

Mynd 7 vísir útsetingina av laksi og sílum frá 2000 til 2008 og eina meting fyri 2009. Myndin vísir, at útsetingin av fiski, tá hon var uppá tað mesta, var 16 mió. Í 2003 og 2004 fall útsetingin sera nógv orsaka av kreppuni. Í 2005 kvinkaði talið av útsettum fiski nakað uppeftir, og í 2007 kom útsetingin upp um 9 mió. Í ár fara umleið 10 mió. stykkir á sjógv, og í 2009 verður roknað við, at beint omanfyri 10 mió. stk. verða sett á sjógv. Í 2007 vóru omanfyri tvær mió. síl sett út og í 2008 verður talið 1,5 mió. Framskrivingar fyri 2009 vísa, at minni enn 0,5 mió. síl verða sett út.

Mynd 7. Útsettur fiskur frá 2000 til 2008 og ein meting av 2009




Kelda: Havbúnaðarfelagið

## 2.7 Aling av toski

Seinastu árini eru royndir gjørdar við toskaaling í Føroyum, og eru úrslitini sera áhugaverd, tá ið samanborið verður við toskaaling í grannalondunum. Hildið verður, at tað serliga er javna hitalagið kring oyggjarnar, sum ger toskaaling í Føroyum áhugaverda. Men nógvir trupulleikar skulu loysast áðrenn trygt grundarlag fæst fyri toskaaling, og nú prísurin er nógv fallin, er trupult at fáa lønsemi í raksturin.

Fiskaaling hevur gjørt royndir við framleiðslu av toskayngli í Nesvík, og okkurt árið hevur gingið hampiligt, men staðfestast má, at startfóðring við náttúruligum æti í posum er sera ótrygg. Eisini hevur Fiskaaling ein PhD-verkætlan, sum skal samanbera genetiskar eginleikar og vakstrareginleikar hjá føroyabankatoski og landgrunstoski.

Á Árnafirði hevur Faroe Salmon gjørt royndir at ala tosk fram til tøku. Lívfrøðiliga eru úrslitini sera lovandi við góðum vøkstir og lítlari kynsbúningin. Í Hvalba ger FaroeCod royndir við toskaaling í resirkulering á landi. Eisini hendan verkætlanin er sera áhugaverd og kann koma at hava stóran týdning fyri menning av toskaaling.

# 3. Mál felagið hevur arbeitt við í árinum

## 3.1 Stongsulin frá russiska marknaðinum

Á summarið 2008 fekk alivinnan fráboðan um, at russiskir matvørumyndugleikar komu á vitja føroyskar alifyritøkur. Undir og eftir vitjanin hevði alivinnan ikki varhugan av, at trupulleikar fóru at stinga seg upp, men vitandi um, at russar høvdu stongt m.a. norðmenn og skotar úti av russiska marknaðin var vandi fyri, at hetta eisini kundi henda fyri føroyska vinnu. Í august mánað kom fráboðan um, at 1. september varð allur føroyskur fiskur útihýstur av russiska marknaðinum.

Síðan tá hevur mikið fundarvirksemi verið og umboð fyri myndugleikar og vinnu hava vitjað í Russlandi fyri at fáa russisku matvørumyndugleikarnar á tal. Einaferð ímóti jólum var avtalað, at føroyskir og russiskir myndugleikar skuldu møtast í Týsklandi í samband við Grúne Woche í januar 2009. Og 15 januar 2009 boðaði HFS frá á heimasíðu sínari at "Heilsufrøðiliga starvsstovan og Rosselkoznadsor hava í dag undirskrivað samstarvsavtalu. Avtalan inniber at føroyingar nú aftur kunnu útflyta fisk og fiskavørur til Russlands. Hesin útflutningur kann byrja aftur tá russarar hava góðkent okkara lista yvir virkir og boða sínum marknaðeftirlitsstøðum frá hesum og at skabelónin til heilsuváttanir er góðkend av russisku myndugleikunum. Um alt gongur sum ætlað er hetta komið í rættlag innanfyri ein mánaða."

Hetta er tó ikki hent enn og alivinnan er sera ótolin eftir, at marknaðarliðið til Russlands skal opna aftur.

## 3.2 Almenn gjøld á alivinnuna hækka alsamt

Alivinnan hevur seinastu árini goldið fyri partar av tí eftirliti, sum heilsufrøðiligu myndugleikarnar hava álagt vinnuni. Hetta hevur serliga snúð seg um eftirlit av ILA yyirvøkuætlanini, eftirlit við óynsktum evnum í alifiski o.l. Seinastu tíðina hava fleiri lógaruppskot verið á Løgtingi har heimild er fingið til vega at áleggja

alivinnuni fleiri gjøld, umframt at kunngerðir eru lýstar, sum hækka munandi um verandi gjøld.

Føroya Havbúnaðarfelag metir tað verða sera óheppið, at gjøld fyrilitarleyst verða løgd á alivinnuna. Felagið hevur gjørt vart við hetta fleiri ferðir seinasta árið, bæði yvirfyri landsstýrisfólkið og vinnunevnd løgtingsins. Ikki kann sigast at lurtað hevur verið eftir felagnum í hesum spurninginum.

Havbúnaðarfelagið er av tí áskoðan, at tað ikki er rímiligt, at tað mestsum bert er alivinnan, ið verður kravd eftir gjøldum, umframt at gjøld um tey verða áløgd vinnuni, standa í mun til tann kostnað, sum eftirlitsmyndugleikin hevur. Havbúnaðarfelagið vil tí heita á politiska myndugleikan um at gera rættningslinjur fyri álegging av gjøldum á vinnuna og at ansa verður eftir at hesi gjøld standa mát við tað, sum eftirlit er við.

### 3.3 Tollur á sílum á ES marknaðinum

Fyri góðum mánaði síðani var tollforðingin á ES marknaðinum fyri føroysk síl avtikin. Fyri 5 árum síðani legði ES toll á síl úr Føroyum orsaka av, at ES metti, at føroysk alivinna hevði dumpað síl á ES marknaðin. Hesin tollur er nú avtikin og er tað at fegnast um.

### 3.4 Alilóggávan endurskoða

Føroya Havbúnaðarfelag hevur seinastu tvey árini luttikið í einum arbeiðsbólki, sum hevur endurskoða alilóggávuna. Nýggja alilógin er nú liðug og klár at fara í Løgtingið. Broytingarnar eru umfatandi og landsstýrismaðurin fær víðar heimildir at regulera alivinnuna við. Hetta er m.a. heimild til at áseta tøknilig krøv til aliútgerðina alt eftir, hvussu útsett og streymhart tað er á aliøkinum. Harumframt eru eisini uppskot um broyting av, hvussu stóru partur einstakur kann eiga av samlaðu loyvunum í alivinnuni øktur frá 25% til 50%. Lógaruppskotið hevur ikki verið til viðgerðar í Løgtinginum enn, men væntandi verður nýggja alilógin samtykt áðrenn Løgtingið fer í summarfrí.

### 3.5 Rakstrarkunngerðin endurskoða

Síðan 2005 hevur verið arbeitt við at endurskoða verandi rakstrarkunngerð. Havbúnaðarfelagið hevur havt kunngerðina til hoyringar fleiri ferðir eisini í 2008. Kunngerðin verður væntandi lýst í næstum, soleiðis sum hon fyriliggur nú. Høvuðsbroytingarnar eru, at aling av lívfiski og smolti nú eisini er umfatað av kunngerðini umframt, at hon setir fleiri krøv til upplýsingarskyldu hjá alivnnnuni til fiskaheilsu myndugleikarnar.
Í hesum sambandi er sonevnda aliskipanin ment, soleiðis at til ber hjá vinnuni elektroniskt at senda kravdu upplýsingarnar til eftirlitsmyndugleikarnar. Havbúnaðarfelagið stóð fyri at menna eina eksportfílu frá FarmControl til aliskipanina, við tí endamálið at lætta um rapporteringsskylduna hjá vinnuni. Skipanin er royndarkoyrd og tikin í nýtslu.

Í rakstrarkunngerðini er, eftir kravi frá Havbúnaðarfelagnum, ein áseting um, at alivinnan saman við myndugleikunum, skal verða umboða í einum bólki, sum skal umsita, í hvønn mun upplýsingar kunnu latast frá skipanini og hvussu hesir kunnu brúkast. Frímund Hansen og Bogi Jacobsen nevndarlimir í Havbúnaðarfelagnum eru umboð felagsins í hesum bólki.

### 3.6 Aliráðstevna 2009

Havbúnaðarfelagið hevur sum undanfarin ár eisini í 2009 skipað fyri aliráðstevnu. Endamálið við ráðstevnuni er at geva starvsfólki í vinnuni høvi at hittast til stevnu, har tey fáa fakliga vitan um aling og sostatt hækkað um kunnleikastøðið í vinnuni. Hetta metir nevndin hevur eydnast væl og eru ætlanir um eisini at fyriskipa ráðstevnu komandi ár.

Á aliráðstevnuni 2009 vóru føstu tættirnar á skránni har Hans Jákup Mikkelsen greiddi frá marknaðarútlitunum fyri laks og síl umframt, at Rúni Dam greiddi frá um lívfrøðiligu gongdina í alivinnuni. Harumframt greiddi Oystein Paturson frá um hvussu streymur ávirkar rúmdina inni í aliringunum. Eins og undanfarin ár vóru eisini útlendskir røðara á aliráðstevnuni. Cato Lyngøy frá Marine Harvest

greiddi frá um vandan fyri smittu av fiskasjúkuni PD gjøgnum rogn og Martin Iversen frá Høgskolen í Bodø greiddi frá um strong av fiski og hvussu strongd ávirkar góðskuna av fiski sum skal setast á sjógv. Frode Oppedal Havforskningsinstituttet í Bergen greiddi frá týdninginum av vatngóðsku fyri trivnaðin hjá fiskinum í aliringum.

## 3.7 Rognaspurningurin

Fiskaaling hevur gjørt av at steðga við at framleiða rogn. Henda avgerð varð tikin fyri nøkrum árum síðani og kynbótaarbeiðið varð steðgað tá. Fiskurin er tó ikki avtikin enn og seinastu fer fiskur verður strokin hjá Fiskaaling verður væntandi til heystar. Spurningurin um, hvussu føroyska alivinnan so skal fáa rogn til vega, hevur verið nógv umrøddur, men eingin endalig niðurstøða er tikin um hetta. Seinasta ár avgjørdi alivinnan bert at keypa rogn úr Íslandi, vegna óvissuna um smittuvanda við at keypa rogn aðrastaðni frá.

Í løtuni verður umrøtt, hvussu føroyska alivinnan skal tryggja sær rogn komandi árini.

## 3.8 Havbúnaðarfelagið er limur í evropeiska alarafelagnum FEAP

Havbúnaðarfelagið er limur í evropeiska alarafelagnum FEAP. Seinastu tvey árini hevur felagið raðfest at møta til fund í felagnum við formanninum umframt skrivara. FEAP tekur mál um sum eru felags fyri evropeisku alivinnuna. Hetta er m.a. ES – lóggáva av ymiskum slagi. FEAP hevur umboð í arbeiðsbólkum sum fáa ES lóggávu til hoyringar og virkar har sum rødd alivinnunar.

Aðalfundurin hjá FEAP í 2009 verður í Føroyum 28-31 mai á Hotel Føroyum. Havbúnaðarfelagið stendur sum fyriskipari og hevur heitt á ferðaskrivstovuna GreenGate um at hjálpa til við at fyrireika tiltakið. Væntandi koma umleið 70 fólk úr limalondunum hjá FEAP til Føroyar á fund.

### 3.9 Tøkuhagtølini

Havbúnaðarfelagið hevur nú í fleiri ár heinta hagtøl um tøkuna av laksi og sílum inn frá kryvjivirkjunum. Hesi hagtøl eru munagóð um so er, at samlaðu tølini kunnu sendast út til limirnar skjótast gjørligt eftir, at ein vika er farin. Mangan er torført at fáa tølini inn og hevur felagið umhugsað í staðin at trekkja tøl úr aliskipanini hjá Heilsufrøðiligu Starvstovuni. Arbeitt verður við hesum og væntandi verða hagtøl tøk frá hesi skipan í 2009.

### 3.10 Endurgjaldsgrunnur alivinnunar avtikin

Endurgjaldsgrunnur alivinnunar er nú avtikin við løgtingslóg. Grunnurin var settur á stovn fyri at veita endurgjalda til alivinnuna um sjúka gjørdi um seg. Tá ILA-sjúkan tók seg upp vísti tað seg, at grunnurin ikki var førur fyri at veita endurgjalda og hevur grunnurin ligið óvirkin í fleiri ár. Í samband við avtøkuna av grunninum, hevur Havbúnaðarfelagið havt málið til hoyringar og mælt til, at peningurin í grunninum var játtaður partvís til Fiskaaling og partvís til Náttúruvísindadeildina, við tí endamálið at fáa gjørt nærri greiningar av streym og sjóvarfall viðurskiftunum á føroysku firðunum.

### 3.11 Landsdjóralæknaembætið flutt til HFS

Í 2008 varð landsdjóralæknaembætið flutt úr Vinnumálaráðnum til HFS. Havbúnaðarfelagið var á fundi við Vinnumálaráðið um hetta mál, tí tað ørkymlaði felagið, at landsdjóralæknaembætið var lagt til ein eftirlitsstovn. Felagið er av tí áskoðan, at landsdjóralæknaembætið hevur eina yvirskipaða uppgávu at tryggja, at heilsufrøðiliga lóggávan er á nóg høgum støði, og at skott er ímillum eftirlitið og hendan partin av umsitingini, tí vandi er fyri at ”ad hoc” lóggáva verður smíðað.